## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og møguliga regn eitt skifti, seinnapartin gul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av útnyrðingi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av norði og sólglottar, men møguliga okkurt ælið. Hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði og landnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 12 og 16 stig.

## DAGSINS FØROYINGUR

# "Tað er fantastiskt at eiga børn"

**28 ára gamla Maibritt í Haraldsstovu flutti úr Danmark til Føroyar við manni og soni teirra í desember mánaði í fjør. Maibritt hevur í løtuni burðarfarloyvi, men mikudagin byrjar hon í nýggjum arbeiði í damudeildini í Handilskjarnanum.**

*Dagsins føroyingur*
*Orð&mynd: Snorri Brend*

**- Hvussu er at vera mamma?**
- At vera mamma er eitt ótrúliga gott følilsi. Tað er fantastiskt og simpelthen tað besta ein kann ynskja sær. Eg hevði ikki trúð at tað var sooo gott, og tí ynski eg mær fleiri børn.

**- Hava tit verið uttanlands í summar?**
- Nei. Vit fluttu heim á jólum, og hava tí ikki verið uttanlands í ár. Vit vóru tó ein fantastiska góðan rundtúr við Norrønu. Vit ætla okkum kortini uttanlands komandi summar, men spara annars upp til at byggja okkum hús í Sørvági.

**- Hvat hevur tú gjørt í morgun?**
- Í morgun fór eg fyrst í vøggustovuna við sonin. Hann skal líkasum venja seg við at vera í vøggustovu, nú eg skal út at arbeiða. Ein tíma seinni fór eg eftir honum aftur. Annars haldi eg bara frí í morgun og njóti at trilla vogn runt í býnum.

**- Hvat heldur tú um føroyska veðrið?**
- Summi siga at føroyska veðrið er gott. Eg kundi sjálv ynskt mær munandi betri veður, so ein kundi sólað sær oftari og grillað. Síðani vit fluttu heim havi eg ikki longst niður aftur til Danmarkar, men í summar havi eg kortini gjørt tað av og á.

**- Hvørjum vilt tú heilsa?**
- Eg vil fegin senda eina heilsu til mammu mína. Hon er ein ótrúliga góð eykamamma hjá soninum Tóka, og verður tað eisini framyvir, nú hann skal venja seg til at vera í vøggustovuni.



*- Eg kundi ynskt mær betri veður í Føroyum, sigur Maibritt í Haraldsstovu*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 11 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 23 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 17 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 25 |
| Keypmannah. | 23 |
| Helsinki | 24 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 15 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 26 |
| Malorca | -- |
| Athen | -- |
| Malta | 26 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 14 |
| New York | -- |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | -- |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | --- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 13 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 997 hPa. við Hetland fer í landsynning og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1011 hPa. við Ísland fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður við Føroyar fríggjadagin.




**Í dag:**
Lágtrýstið eystan fyri Ísland stendur mestsum í stað. Brúgvalagið við Føroyar hvørvur eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 8/8 kl. $06^{00}$– 9/8. $06^{00}$. Hitin í gjár: 10,6°
Minsti hiti máldur í august: 0,2° - Mesti hiti máldur í august: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 10,6 mm – mált frá 7/8 kl. $06^{00}$– 8/8 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í august: 25,7 mm


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI





## VESTFALLSKYRRINDI

10. august — Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. Aug | 08.05 | 20.30 | 07.05 | 19.30 | 07.20 | 19.45 | 10.05 | 22.30 | 11.05 | 23.30 | 06.20 | 18.45 | 05.20 | 17.45 | 08.20 | 20.45 | 09.20 | 21.45 | 07.50 | 20.15 | 09.05 | 21.30 |
| 11. Aug | 08.55 | 21.19 | 07.55 | 20.19 | 08.10 | 20.34 | 10.55 | 23.19 | 11.55 | - | 07.10 | 19.34 | 06.10 | 18.34 | 09.10 | 21.34 | 10.10 | 22.34 | 08.40 | 21.04 | 09.55 | 22.19 |
| 12. Aug | 09.43 | 22.06 | 08.43 | 21.06 | 08.58 | 21.21 | 11.43 | - | 00.19 | 12.43 | 07.58 | 20.21 | 06.58 | 19.21 | 09.58 | 22.21 | 10.58 | 23.21 | 09.28 | 21.51 | 10.43 | 23.06 |
| 13. Aug | 10.30 | 22.53 | 09.30 | 21.53 | 09.45 | 22.08 | 00.06 | 12.30 | 01.06 | 13.30 | 08.45 | 21.08 | 07.45 | 20.08 | 10.45 | 23.08 | 11.45 | - | 10.15 | 22.38 | 11.30 | 23.53 |
| 14. Aug | 11.17 | 23.41 | 10.17 | 22.41 | 10.32 | 22.56 | 00.53 | 13.17 | 01.53 | 14.17 | 09.32 | 21.56 | 08.32 | 20.56 | 11.32 | 23.56 | 00.08 | 12.32 | 11.02 | 23.26 | - | 12.17 |

5 707265 100050 >